

Ólavur Ellefsen, stjóri í Simprentis verður við í kjakpanelinum á Vinnudegnum, sum hevur heitið: \\\\"Hvat skulu vit duga\\\\".

# Vinnudagurin: Hvat skulu vit duga

Deil:

**Jan Müller**

22.09.2014 - 12:42

Oljan.fo

Aftur í ár verður spennandi kjak á skránni á Vinnudegnum – hesuferð er evnið “Hvat skulu vit duga”. Til at kjakast um hetta evnið vera  Gunnbjørn Joensen, stjóri í Thor, Ólavur Ellefsen, stjóri í Simprentis og Erika Hayfield, adjunkt í samfelagsvísindum á Fróðskaparsetri Føroya. Kjakið verður stýrt av Stefan í Skorini og Óluvu Zachariassen.

Hátíðardagurin hjá føroyskari vinnu verður fríggjadagin. Áhugin fyri Vinnudegnum er aftur í ár stórur, og væntandi verða knapt 400 føroysk vinnulívsfólk og fólk, sum hava tilknýti til føroyska vinnu, í Norðurlandahúsinum fríggjadagin 26. september. Melda til á www.industry.fo.

Skráin fyri Vinnudagin 2014 er fjølbroytt við áhugaverdum fyrilestrum, spennandi kjaki og sjálvandi avdúkingini av Ársins Virki og Ársins Átaki. Á skránni eru fyrilestrar við Dr. Jonas Ridderstråle, rithøvunda av metsølubókunum “Funky Business” og “Karaoke Capitalism”, Johan Bülow, stjóra og stovnara av Lakrids by Johan Bülow, og Boga Bech Jensen, stjóra og professara á Fróðskaparsetur Føroya.

Tilmelding til Vinnudagin fer fram á www.industry.foella við at ringja til Vinnuhúsið á telefon 309900. Freistin at melda til er mikudagin.